**Almanna- og mentamálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 8. apríl 2025 |
| Mál nr.: | 25/09048 |
| Málsviðgjørt: | HP |
| Ummælistíð: | N/A |
| Eftirkannað: | 6. apríl 2025 |

# Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

(Tíðartreytað pensjón o.a.)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 117 frá 9. desember 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, stk. 1, nr. 5-7 verða orðað soleiðis:
“5) lægsta fyritíðarpensjón,
6) veitingar eftir kapitli 11,
7) avlamisveiting og”

**2.** Í § 2, stk. 1 verður aftan á nr. 7 sum nýtt nr. sett:
“8) tíðartreytað pensjón.”

**3.** Aftan á § 8 a verður sett:

“*Tíðartreytað pensjón*

**§ 8 b.** Tíðartreytað pensjón kann frá 1. januar 2035 tillutast persóni, sum frá tí fylta 16. árinum í minsta lagi í 50 ár hevur verið arbeiðsvirkin.
*Stk. 2.* Kravið um arbeiðsvirkni sambært stk. 1 lækkar við 56 vikum fyri hvørt barnið, ið umsøkjari hevur átt ella ættleitt. Hevur umsøkjari verið arbeiðsvirkin í hesum tíðarskeiði, telur arbeiðstíðin ikki við sum arbeiðsvirkni sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Persónur, ið hevur havt fastan bústað í Føroyum, meðan hann hevur arbeitt í útlondum, er at rokna sum arbeiðsvirkin sambært stk. 1. Persónur, ið hevur búð og arbeitt í øðrum Norðurlandi, er at rokna sum arbeiðsvirkin sambært stk. 1.
*Stk. 4.* Umsøkjari skal útvega skjalprógv um sítt arbeiðsvirkni.

**§ 8 c.** Persónur, sum í einum skattaári í minsta lagi hevur havt arbeiðsinntøku svarandi til hálva ársløn hjá ófaklærdum sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, er roknaður at hava verið arbeiðsvirkin. Hevur persónur

verið arbeiðsvirkin part av einum ári, skal arbeiðsinntøkan hava verið hálv ársløn sambært 1. pkt. deilt við talið av mánaðum, sum arbeiðsvirknið fevnir um.
*Stk. 2.* Tíðarskeið við lærlingaløn er at rokna sum full tíð.
*Stk. 3.* Hesar veitingar eru javnsettar við arbeiðsinntøku:
1) Dagpeningur vegna sjúku.
2) Arbeiðsloysisstuðul sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.
3) Barsilspeningur sambært løgtingslóg um barsilsskipan, undantikið tá 56 vikur eru frádrignar sambært § 8 b, stk. 2.
4) Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.
5) Lønarískoyti til tillagað starv sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.
6) Samsýning til fosturforeldur sambært løgtingslóg um barnavernd.
7) Ansingarsamsýning sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

*Stk. 4.* Í tann mun onnur Norðurlond hava veitingar, ið eru sambærligar við veitingar sambært stk. 3, eru tær javnsettar við arbeiðsinntøku.
*Stk. 5.* Arbeiðsinntøka og inntøka sambært stk. 3, ið er forvunnin sama tíðarskeið sum lestrarstuðul, telur ikki sum inntøka.
*Stk. 6.* Sjálvstøðugt vinnurekandi er roknaður sum arbeiðsvirkin fyri tey tíðarskeið, hann skjalprógvar, at hann hevur verið sjálvstøðugt vinnurekandi.

**§ 8 d.** Persónur, ið fær tillutað tíðartreytaða pensjón, fær eina upphædd svarandi til miðal fyritíðarpensjón.
*Stk. 2.* Tíðartreytað pensjón lækkar við 60% av tí partinum av arbeiðsinntøkuni, sum er hægri enn 20% av grundløn hjá fastløntum sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, umroknað til ársløn.
*Stk. 3.* Tíðartreytað pensjón verður ikki útgoldin til persón, sum samstundis fær aðra uppihaldsveiting frá tí almenna, dagpengaveiting, arbeiðsloysisstuðul, barsilsveiting pensjón ella líknandi veiting."

**4.** Sum yvirskrift yvir § 9 verður sett:

"*Aðrar treytir*"

**5.** Í § 13, stk. 3 verður "fyritíðarpensión ella framskundaðari pensjón" broytt til: "fyritíðarpensjón, framskundaðari pensjón ella tíðartreytaðari pensjón".

**6.** Í § 26, stk. 2 verður "fyritíðarpensión, framskundaða pensjón ella avlamisveiting" broytt til: "fyritíðarpensjón, framskundaða pensjón, tíðartreytaða pensjón ella avlamisveiting".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskot er lagt fyri Løgtingið um, at pensjónsaldurin frá 2035 hækkar við trimum mánaðum um árið, inntil pensjónsaldurin røkkur 70 árum í 2042. Tað eru løntakarar, sum so at siga alt sítt vaksna lív hava verið á arbeiðsmarknaðinum, og sum sostatt hava verið arbeiðsvirkin longur enn tey flestu. Mett verður, at tey, sum frá heilt ungum árum hava verið arbeiðsvirkin, verða serliga ávirkað av hækkingini í pensjónsaldrinum, og tí er tørvur á at veita hesum møguleika fyri at fara av arbeiðsmarknaðinum við pensjón áðrenn ásetta pensjónsaldurin.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Fólkapensjónsaldurin hækkaði tann 1. juli í 2024 úr 67 árum upp til 67½ ár. Pensjónsaldurin hækkar aftur í 2030 til 68 ár. Uppskot er lagt fyri Løgtingið um, at pensjónsaldurin í tíðarskeiðinum 2035 til 2042 hækkar upp til 70 ár (løgtingsmál nr. 73/2024).

Umleið 25-30 prosent av føroyingum eru farnir av, ella lutvíst farnir av arbeiðsmarknaðinum áðrenn fólkapensjónsaldurin er rokkin. Talan er um persónar, sum fáa fyritíðarpensjón, framskundaða pensjón ella eru í tillagaðum starvi. Treytin fyri at fáa tillutað fyritíðarpensjón, framskundaða pensjón ella tillagað starv er, at arbeiðsførið er varandi skert. Høvuðsreglan er, at fyritíðarpensjón kann ikki játtast, um tað er gjørligt at seta í verk fyriskipan eftir løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk – undir hesum eisini tillagað starv. Men hetta er, sambært § 5 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., ikki galdandi fyri persón, ið er fyltur 60 ár.

Tað er ikki nøkur skipan ella veiting til tey, sum ikki hava skerdan arbeiðsførleika, men sum ynskja at fara av arbeiðsmarknaðinum áðrenn fólkapensjónsaldurin er rokkin. Tað eru persónar, sum alt sítt vaksna lív hava havt fast tilknýti til arbeiðsmarknaðin, men sum ikki lúka treytirnar fyri at fáa fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón.

Tað er í sambandi við fólkapensjón og fyritíðarpensjón ongi krøv um tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Tíðartreytað pensjón er til tey, sum á heilt ungum árum eru farin á arbeiðsmarknaðin, og sum í 50 ár hava verið arbeiðsvirkin ella havt tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Tíðartreytað pensjón verður verður veitt frá 1. januar 2035, og skipanin fer tí ikki at virka fyrr enn tá.

Umsøkjari um tíðartreytaða pensjón skal skjalprógva, at hann hevur verið arbeiðsvirkin í 50 ár. Ein týðandi partur av hesum væntast at fáast til vegar umvegis Borgaragluggan hjá TAKS. Føroyska kelduskattaskipanin varð tikin í brúk í 1984, og allar lønarflytingar umvegis føroysku skattaskipanina aftur til 1. apríl 1984 eru sostatt at finna í Borgaragluggganum. Skjalprógv fyri arbeiðsvirkni áðrenn 1. apríl 1984 ber ikki til at fáa til vegar frá almennum myndugleika, og tað avmarkar møguleikarnar at seta í verk eina skipan, sum krevur skjalprógv fyri tíðarskeiðið áðrenn 1984.

Arbeiðsloysisstuðul, sjúkradagpeningur, barsilsveiting og ávísar aðrar veitingar eru javnsett við arbeiðsløn, og persónur er tí roknaður at vera arbeiðsvirkin, tá hann hevur fingið hesar veitingar.

Barsilspeningur útgoldin til kvinnur, ið hava átt børn, og til ættleiðingarforeldur, telur tó ikki sum arbeiðsløn. Í staðin verða 56 vikur fyri hvørt barnið frádrignar treytini um 50 ára arbeiðsvirkni. Barsilsskipanin varð ikki sett á stovn fyrr enn í 1999, og áðrenn tað vóru viðurskiftini kring barsilsfarloyvi óskipað. Nakrar kvinnur fingu tørvsmetta forsorgarveiting, men flestu kvinnur hava onga inntøku havt í sambandi við barsilsfarloyvi. Tey fyrstu nógvu árini aftaná, at Barsilsskipanin var stovnað, varð barsilsgjald veitt í umleið hálvt ár. Nógvar kvinnur vóru tó burtur frá arbeiði í longri tíð, uttan inntøku. Við hesum uppskotinum verða allar kvinnur, ið hava átt børn, javnsettar og 56 vikur frádrignar kravinum um 50 ára arbeiðsvirkni. Tað sama verður galdandi fyri ættleiðingarforeldur. Í dag er barsilsfarloyvi 52 vikur, umframt 4 vikur áðrenn føðing.

Tað eru eisini avbjóðingar at skjalprógva arbeiðsloysi, tí Arbeiðsloysisskipanin varð ikki sett á stovn fyrr enn í 1992. Persónur, ið var raktur av arbeiðsloysi áðrenn 1992, kundi undir serligum treytum fáa eina tørvsmetta forsorgarveiting. Men tað vóru eisini nógv, sum onga inntøku høvdu í sambandi við arbeiðsloysi.

Endamálið við skipanini við tíðartreytaðari pensjón er at røkka teimum, sum eru farin til arbeiðis á heilt ungum árum, og sum hava havt kropsliga tyngjandi arbeiði og tí ynskja at fara av arbeiðsmarknaðinum. Tað er sostatt ikki eitt endamál, at hetta skal vera ein pensjón, sum kemur aftrat lønarinntøkuni hjá teimum, sum halda fram á arbeiðsmarknaðinum, eins og tað er hjá arbeiðandi fólkapensjónistum og lægstu- og miðal fyritíðarpensjónistum. Tó er ásett eitt bagatellmark, soleiðis at tíðartreytað pensjón ikki verður ávirkað av arbeiðsinntøku upp til 20 prosent av eini arbeiðsmannaløn (sum í 2025 er umleið 67.000 kr. um árið). Fer inntøkan upp um markið, verður inntøkan mótroknað við 60 prosentum.

Tað er ikki ein treyt, at umsøkjari skal hava arbeitt fulla tíð. Treytin fyri at verða roknaður sum arbeiðsvirkin er, at ársinntøkan í minsta lagi hevur verið svarandi til hálva ársløn hjá einum ófaklærdum arbeiðsfólki. Tað ber ikki til at áseta treytir um tímatal, orsakað av avmarkingum í eldri skrásetingum.

Lestrarár, har persónur hevur móttikið lestrarstuðul, telja sambært uppskotinum ikki sum arbeiðsvirkin, uttan mun til um viðkomandi hevur havt arbeiðsinntøku aftrat lestrarstuðlinum.

Sjálvstøðug vinnurekandi kunnu eisini fáa tíðartreytaða pensjón, um tað ber til at skjalprógva, at tey hava verið sjálvstøðug vinnurekandi.

Persónur, ið fær tillutað tíðartreytaða pensjón, fær eina veiting samsvarandi miðal fyritíðarpensjón. Miðal fyritíðarpensjón í 2025 er 12.731 kr. um mánaðin áðrenn skatt. Tá gjald til AMEG, Heilsutrygd og Kringvarp er frádrigið er upphæddin 12.275 kr. Upphæddin til gift og samlivandi, tá gjøld eru frádrigin, er 10.732 kr. um mánaðin. Fyritíðarpensjón er sett saman av eini grundupphædd, viðbót og avlamisviðbót. Grundupphæddin og avlamisviðbótin eru skattafríar, meðan viðbótin er skattskyldug. Saman við ein serligum frádrátti til fyritíðarpensjónistar, sum er ásettur í løgtingslóg um áseting av skatti, hevur tað við sær, at fyritíðarpensjónistar ikki rinda lands-, kommunu- og kirkjuskatt av pensjónsveitingini. Persónur, sum fær fyritíðarpensjón hevur eisini rætt til *viðbót til ávísar pensjónistar* sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar. Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar fevnir ikki um tíðartreytaða pensjón.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Uppskotið hevur við sær, at persónur, ið hevur verið arbeiðsvirkin í 50 ár frá tí fylta 16. árinum kann fáa tíðartreytaða pensjón. Tíðartreytað pensjón er ein veiting samsvarandi miðal fyritíðarpensjón.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Av tí at tað ikki ber til at siga, hvussu nógv fólk lúka treytirnar til tíðartreytaða pensjón, ber ikki til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum. Talið av persónum, sum fara heilt tíðliga á arbeiðsmarknaðin, fækkast sum árini ganga, og tí væntast talið av játtanum at blíva avmarkað.

Tíðartreytað pensjón er samsvarandi miðal fyritíðarpensjón, sum í 2025 er 152.772 kr. um árið til støk og 134.172 til gift og samlivandi, og útreiðslur á § 12 almannamál fara sostatt at hækka við hesum upphæddum fyri hvønn persón, ið fær játtað pensjónina. Harafturat skal havast í huga, at talan verður í ein ávísan mun um persónar, sum fara frá at hava skattskyldugar arbeiðsinntøkur, til at fáa eina pensjón, har tey ikki rinda lands- ella kommunuskatt.

Kommunurnar kunnu missa eitt sindur av skattainntøkum.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað er ásett, at tað er skylda umsøkjarans at útvega skjalprógv fyri arbeiðsvirkni. Men kortini hevur uppskotið við sær umfatandi umsitingarligar avleiðingar fyri Almannaverkið. Skrásetingar í Borgaraglugganum, sum í stóran mun fara at verða brúktar sum grundarlag undir skjalprógvum, fara væntandi at elva til ivamál og spurningar.

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna. Men arbeiðsútboðið væntast at minka eitt sindur.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær, at persónar, sum frá heilt ungum árum hava verið arbeiðsvirknir, og hava havt støðugt tilknýti til arbeiðsmarknaðin í 50 ár, fáa møguleika at fara av arbeiðsmarknaðinum og fáa tíðartreytaða pensjón.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Í uppskotinum eru atlit tikin til Nordisk konvention af 12. juni om social sikring. Persónur, sum áður hevur búð og arbeitt í øðrum Norðurlandi kann søkja um tíðartreytaða pensjón. Arbeiðstíð

í landinum, sum viðkomandi hevur búð í, telur við, tá tíð á arbeiðsmarknaðinum verður gjørd upp.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið verður ikki mett at vera í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið verður ikki mett at stríða ímóti Evropeiska mannarættindasáttmálanum.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið er soleiðis orðað, at arbeiðsvirkni í øðrum Norðurlandi telur við, tá tilknýtið til arbeiðsmarknaðin verður gjørt upp. Tað merkir, at persónur, ið hevur búð og arbeitt í øðrum Norðurlandi, kann søkja um tíðartreytaða pensjón.

Persónur, ið hevur havt fastan bústað í Føroyum, meðan hann hevur arbeitt uttanlands, kann eisini søkja um tíðartreytaða pensjón, tí í hesum førum telur arbeiðsvirkni í útlondum við, tá arbeiðsvirkni verður gjørt upp.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparliga r avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarli gar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisli gar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Til nr. 1 og 2*
Tíðartreytað pensjón verður sett inn sum ein sjálvstøðug veiting, sum verður ein gildug veiting frá 1. januar 2035. Harvið eru somu treytir galdandi viðvíkjandi heimarætti, bústaði o.a. ásett í § 3.

*Til nr. 3*
*§ 8 b, stk. 1*
Persónur, sum hevur verið arbeiðsvirkin í 50 ár frá tí fylta 16. árinum, kann frá 1. januar 2035 fáa tíðartreytaða pensjón. Tað merkir, at persónurin skal vera fyltur 16 ár, áðrenn árini á arbeiðsmarknaðinum byrja at telja í sambandi við arbeiðsvirkni.

*§ 8 b, stk. 2*
Endamálið við ásetingini er at javnseta kvinnur, ið hava átt børn áðrenn Barsilsskipanin varð sett á stovn við kvinnur, sum eiga børn í dag, har farloyvistíðarskeiðið er 52 vikur + 4 vikur áðrenn føðing. Ein kvinna, sum t.d. hevur átt 2 børn, skal hava verið arbeiðsvirkin í 50 ár minus 112 vikur fyri at fáa rætt til tíðartreytaða pensjón.

Tær 56 vikurnar fyri hvørt barnið verða frádrignar uttan mun til, um umsøkjarin hevur fingið arbeiðsløn fyri sama tíðarskeið. Møgulig arbeiðsløn í teimum 56 vikunum, sum eru frádrignar telja ikki við sum arbeiðsvirkni, tá arbeiðstíðin verður gjørd upp.

*§ 8 b, stk. 3*
Persónur, ið hevur havt fastan bústað í Føroyum, meðan hann hevur arbeitt í útlondum, er at rokna sum arbeiðsvirkin. Treytin er, at persónurin kann skjalprógva sítt arbeiðsvirkni. Tað er ikki nøkur avmarking í, hvørjum landi persónurin hevur arbeitt.

Hevur persónur búð og arbeitt í øðrum Norðurlandi, telur arbeiðsvirknið, sum persónurin hevur havt í tí landinum, við í sambandi við arbeiðsvirkni. Persónurin kemur tó undir vanligu treytirnar í § 3 í løgtingslógini.

Við onnur Norðurlond er at skilja Danmark, Finnland, Grønland, Ísland, Norra, Svøríki og Áland.

*§ 8 b, stk. 4*
Tað er umsøkjari, sum sjálvur skal útvega skjalprógv fyri, at hann hevur verið arbeiðsvirkin. Hetta er galdandi, bæði tá talan er um skjalprógv fyri arbeiði og veitingar í Føroyum og uttanlands.

*§ 8 c, stk. 1*
Fyri at verða roknaður sum arbeiðsvirkin, skal inntøkan í einum skattaári í minsta lagi hava verið hálv årsløn hjá ófaklærdum arbeiðsmanni (sáttmálin millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag). Um ein persónur t.d. einans hevur fingið eina ella tvær stórar lønarflytingar í einum ári, sum tilsamans eru hægri enn hálv arbeiðsmannaløn, so skal umsøkjari kunna vísa á, at flytingarnar eru fyri støðugt arbeiði. Um talan t.d. er um tveir stuttar

túrar til skips, og persónurin annars ikki hevur arbeitt ein stóran part av árinum, so telur tíðin, har hann ikki hevur arbeitt, ikki sum arbeiðsvirkin.

Ásetingin tekur ikki hædd fyri, at ungdómar hava lægri løn. Ein 16 ára gamal, sum t.d. arbeiðir fyri 3/4 sáttmálaløn, skal eisini hava ársinntøku hægri enn hálv arbeiðsmannaløn hjá vaksnum fyri at vera roknaður sum arbeiðsvirkin.

Hjá persóni, sum fer til arbeiðis mitt í einum ári – t.d. eftir eina summarferiu tann 1. august – er kravið, at inntøkan tað árið er 5/12 av eini hálvari arbeiðsmannaløn. Tað sama ger seg galdandi, um persónurin t.d. fyllir 16 ár mitt í árinum, og hann tá fer til arbeiðis.

Neyðugt verður hjá Almannaverkinum við støði í lønarsáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag at rokna upphæddina, sum svarar til eina hálva ársløn 50 ár aftur í tíðina.

*§ 8 c, stk. 2*
Tíðarskeið við lærlingaløn telur sum full tíð. Hetta merkir, at fyri tíðarskeiðið, ein persónur hevur fingið lærlingaløn, er ikki neyðugt at kanna eftir, um hann lýkur treytina um hálva arbeiðsmannaløn.

*§ 8 c, stk. 3*
Ásetingin vísir, hvørjar veitingar eru javnsettar við arbeiðsinntøku. T.d. ein, sum hevur móttikið dagpening vegna sjúku, er roknaður sum arbeiðsvirkin í tíðarskeiðinum, sum hann hevur móttikið veitingina.

Í stk. 3, nr. 3 stendur, at barsilspeningur, sambært løgtingslóg um barsilsskipan, er javnsettur við arbeiðsinntøku, undantikið tá 56 vikur eru frádrignar sambært § 8, stk. 2. Um umsøkjari, sum er ein kvinna, hevur átt eitt barn og tí hevur fingið frádrigið 56 vikur frá kravinum um 50 ára arbeiðsvirkni, so telur barsilspeningurin, sum hon hevur fingið frá Barsilsskipanini, ikki sum arbeiðsinntøka. Um ein umsøkjari, sum er maður, hevur ættleitt eitt barn og tí hevur fingið frádrigið 56 vikur frá kravinum um 50 ára arbeiðsvirkni, so telur møguligur barsilspeningur ikki sum arbeiðsinntøka.

Í stk. 3, nr. 4 stendur ”endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.” Áðrenn løgtingslóg um almannatrygd varð sett í gildi, hevði veitingin heimild í forsorgarlógini, sum nú er sett úr gildi. Ásetingin í stk. 3, nr. 4 er eisini galdandi fyri veitingarnar, sum blivu útgoldnar við heimild í forsorgarlógini.

Í stk. 3, nr. 5 stendur ”lønaráskoyti til tillagað starv sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.” Áðrenn løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk var sett í gildi, var lønaráskoyti útgoldið við heimild í forsorgarlógini. Ásetingin í stk. 3, nr. 5 er eisini galdandi fyri lønaráskoyti, sum bleiv útgoldið við heimild í forsorgarlógini.

*§ 8 c, stk. 4*
Persónur, sum hevur fingið veiting úr øðrum Norðurlandi, sum er sambærlig við veitingarnar í stk. 3, er roknaður at verða arbeiðsvirkin í tíðarskeiðinum, hann hevur móttikið veitingina.

*§ 8 c, stk. 5*
Ásetingin merkir, at persónur, ið hevur móttikið lestrarstuðul, ikki kann roknast sum arbeiðsvirkin í tíðarskeiðinum, sum lestrarstuðulin er galdandi fyri. Hetta er eisini galdandi fyri lestrarstuðul móttikin í og úr útlondum.

*§ 8 c, stk. 6*
Persónur, sum hevur verið sjálvstøðugur vinnurekandi kann eisini søkja og fáa játtað tíðartreytaða pensjón. Treytin er, at hann skjalprógvar, at hann hevur verið sjálvstøðugt vinnurekandi. Fyri at skilmarka, hvat er vinnuligt virksemi, verður tann sama skilmarkanin brúkt sum í galdandi skattalóggávu.

*§ 8 d, stk. 1*
Tíðartreytað pensjón er sama upphædd sum miðal fyritíðarpensjón. Tað merkir, at um persónurin er stakur, so fær hann somu upphædd sum stakur miðal fyritíðarpensjónistur. Er hann giftur ella samlivandi, fær hann somu veiting sum giftur ella samlivandi fyritíðarpensjónistur.

*§ 8 d, stk. 2*
Persónur við tíðartreytaðari pensjón kann hava arbeiðsinntøku upp til 20 prosent av grundløn hjá fastløntum sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, umroknað til ársløn, uttan at pensjónin verður ávirkað.

Inntøka, sum er hægri enn 20 prosent av grundløn hjá fastløntum, lækkar við 60 prosentum av tí partinum av inntøkuni, sum er hægri enn markið. Hetta er mótrokning, sum verður gjørd á sama hátt sum mótrokning hjá t.d. fólka- og fyritíðarpensjónistum. Munurin er, at mótrokningarprosentið er hægri í sambandi við tíðartreytaða pensjón.

Í hesi ásetingini verður sáttmálin hjá mánaðarløntum brúktur. Orsøkin er, at fastlønarsáttmálin er einfaldari at meta um. Í nýggju ásetingini í § 8 c, stk. 1 í hesum uppskotinum, verður brúkt løn hjá tímaløntum. Orsøkin er, at tað er bara í nýggjari tíð, at fastlønarsáttmáli er partur av semjuni millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Nevndarsamsýningar, ítróttarsamsýningar, løn fyri borgaraskyldu o.t. eru at meta sum arbeiðsløn.

*§ 8 d, stk. 3*
Sambært ásetingini kann tíðartreytað pensjón ikki útgjaldast til persón, sum samstundis fær aðra uppihaldsveiting frá tí almenna, dagpengaveiting, arbeiðsloysisstuðul barsilsveiting, pensjón ella líknandi. Eisini endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur kemur undir hesa áseting.

Veitingar, so sum familjuískoyti, serligt barnaískoyti til stakar uppihaldarar og annar stuðul, sum er til ítøkiligar útreiðslur, sum t.d. fíggjarligt ískoyti sambært § 19, 24 og 29 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, koma ikki undir hesa áseting.

*Til nr. 4*
Broyting av tekniskum slag – nýggj yvirskrift yvir § 9.

*Til nr. 5*
Eins og við fyritíðarpensjón og framskundaðari pensjón, so er er tað eisini galdandi fyri tíðartreytaða pensjón, at hon verður útgoldin við eins nógvum fjørutiundapartum, tá persónur flytur til fólkapensjón.

*Til nr. 6*
Eins og við fyritíðarpensjón og framskundaðari pensjón er ikki neyðugt hjá persóni við tíðartreytaðari pensjón at søkja um fólkapensjón, tá fólkapensjónsaldurin er rokkin. Fólkapensjónin verður veitt uttan umsókn, tá persónurin longu er fevndur av lógini.

**Til § 2**
Gildiskoma

Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Men tíðartreytað pensjón er ikki ein gildug veiting fyrr enn frá 1. januar 2035.

Almanna- og mentamálaráðið, 8. apríl 2025

**Eirikur í Jákupsstovu**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur